arar, útróðrarmenn, bønarmenn, hosubindarar og húski teirra, búðu fram til um 1860 uttan um eystaru vágna og á reynunum millum Húsagarð og handilshúsini í Tinganesi. Enn standa nógv hús í trunka næstan sum í seinmiðøld. Húsatalið í Havn var í 1784 skrásett at vera um 134. Nýggj kirkja varð bygd norðan fyri býin í 1788. Nú eru færri bústaðrhús enn tá, av tí at hús vórðu tikin niður og flutt út á traðir og í nýggjar býlingar við Tinghúsvegin og í Bø seinast í 1800 árunum.

Lendið er heyggjut og stundum bratt. Gøturnar út eftir reynunum hava hampiliga javnt hall oman og niðan, meðan tær báðar gøturnar tvørturum, Bringsnagøta og Bakkahella, ganga brattar upp á herðurnar og niður av aftur. Reynagøta ber sítt navn av røttum, og nógvastaðni kemur tann bera hellan undan. Í støðum eru innigirdir urtagarðar, men annars standa húsini ofta á øllum grundstykkinum, sum liggur til ognina. Her er tætt millum húsini, alt mátti koma til gangs, og tað, ið var eftir av óbygdum, lá sum skot og gøtur, goymslupláss, verjuvirki og kirkjugarðar. Kirkjugarðarnir eru til enn, men har verður ikki longur grivið. Tveir stórir urtagarðar eru, Bojsensgarður við bókahandilin og ein urtagarður á gamla dunganum sunnan fyri Bringsnagøtu. Báðir venda vestureftir.

Annars eru tað tey trongu ferðsluøkini, sum gera vart við seg, tey fæstu kannað fólki at ganga á, flestu teirra latin til bilar at koyra og standa á. Gamla steinsetingin er næstan allastaðni farin undir asfalt.

Umhvørvið í gamla býnum er sjaldsamt og einastandandi, tí her er ein bygging við uppruna og dámi úr seinmiðøld, ein bygging, har fólk framvegis búgva og brúka húsini. At tey einstøku timburhúsini so hvørt eru umvæld og endurbygd, er partur av byggisiðinum. Hóast hús eru tikin niður ella flutt, og tó at bygningar útivið eru bygdir í størri mátum og í helt øðrvísi sniði, so er býarparturin óvanliga heilskapaður, spennandi og hugfarsliga ríkur. Tað merkir ikki, at eingin tørvur er á at bøta um. Tað ber væl til at fáa tún og gøtur vakrari við miðvísum steinsetingum og útgerð av ymisku slag. Bara í einstøkum støðum ber til at síggja, hvussu einaferð var lagt á gøturnar ella síggja hellurnar koma undan. Einstøk hús eru illa farin, og bilarnir fylla nógv. Tað hevði verið fyrimunur at kunnað býtt sundur millum øki til bilar og fólk til gongur og - hóast tað altíð er trupult – at víst frásettar bilar til onnur øki nærhendis, eitt nú við Eystaru Bryggju."

(Brotið "Gamli býruin millum vágirnar" úr býaratlasinum)

## Hugsa aftur og fram í tíð

Tórshavnar býaratlas er sera áhugaverdur lesnaður – ikki minst hjá fólki, sum vilja søkja sær innlit býarsøguna og hvussu býurin er mentur til tað, hann er í dag. Vit kunnu so bara vóna, at tann skjøtil, sum nú er settur á hetta arbeiði, fer at gagna víðari býarmenningini í Havn. Um Tórshavnar Býráð vil skapa tær umstøður, sum skulu til, so fer hetta at eydnast. Vit kunnu enda við síðstu orðunum í atlasinum:

- Hús og umhvørvi hava aðra tíð enn okkara egnu og vera standandi til ókomin ættarlið. Tí er tað okkara ábyrgd og ábyrgdin hjá góðari býarbygging at hugsa bæði aftur í tíð og langt fram í tíðina. Kunnu vit skipa so fyri, at okkara eftirkomarar fara at gleðast um tað, sum einaferð varð gjørt og eisini tað, sum varð gjørt í okkara tíð, so er okkara heimbýur væl farin.

*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*




*Landslagið uttan um Havnina sæð úr landnyrðingi. Grøni liturin vísir velta lendið og báðar teir stóru dalarnar: Havnardal og Hoydalar. Gamli býurin og Tinganes tykjast smá í allari heildini. Stórur partur av býarøkinum vendir sær framvegis móti gamla býnum og havnalagnum, soleiðis sum býarpartar og vegir millum Hoydalar og Argir eru skipaðir. Høgrumegin í myndini taka býlingarnir millum Gilja og Inni á Gøtu seg burturúr. Hesin seinni er bygdur høgt uppi yvir landsvegnum oman fyri Hvítanes*




*Reyðu litirnir á kortinum vísa, hvussu varðveitingarvirði er á bygningum í Havn. Heilt myrki liturin sigur, at ognin hevur varðveitingarvirðið 1 – sum merkir, at ognin er friðað sum fornminni. Ognir, merktar við hvítum, eru ikki varðveitingarmettar, einans skrásett, meðan grái liturin vísir aðrar bygningar. Sí annars talvuna niðast í høgra horni á kortinum*